## Tokvanlukka í Italia

Minst 13 fólk doyðu, og umleið 30 fingu skaða, tá eitt góðstok fór út av jarnbreytini í italska býnum Viareggio. Myndugleikarnir siga, at tveir av vognunum vóru fermdir við gassi, og at teir sprongdust av stoyrinum, tá tokið fór útav. Jarnbreytin í Viareggio er ímillum húsini, og tokvognarnir rendu á fleiri hús. Tokið var á veg úr La Spezia til Pisa, tá vanlukkan hendi. Teir báðir tokførarnir sluppu við lívinum og teir hava greitt frá, at teir hildu tokið fáa ein lítlan stoyt, áðrenn tað fór av breytini. Myndugleikarnir halda, at vanlukkan stóðst av trupulleikum við jarnbreytini ella bremsunum á tokinum.



## Ætlar sær heimaftur

Forsetin í Honduras, Zelaya, sum varð rendur av landinum sunnukvøldið, sigur nú, at hann fer heimaftur hósdagin. Tað var herurin, sum tók forsetan og sendi hann við einum flogfari til Costa Rica. Aftaná boðaði herurin frá, at hann hevði tikið valdið í landinum, men forsetin sigur, at talan er ikki um nakað kvett, og at fer heim aftur hósdagin. Hann sigur eisini, at hann hevur boðið fýra stjórnarleiðarum í Mið- og Suðurmaerika til Honduras at vitja. Men hann kann fáa ein trupulleika, tí tjóðartingið hevur longu sett tingformannin í nembætið sum fyribilsforseti, skrivar AP.

# 100 fólk hjá Articon inn-rás í Skúvoy

**Seinasta leygardag gjørdi byggifelagið Articon ein starvsfólka-og familjutúr út til Skúvoyar, har næstan hundrað fólk vóru við í ferðalagnum. – Hetta var ein heilt fantastiskur túrur, sigur stjórin, Jón Danielsen**

ÚTFERÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta er tíðin, tá útferðar-hugur kemur á fólk og familjur.

Í góðveðrinum seinasta leygardag gjørdi byggifelagið Articon eina starvsfólka-og familjuútferð til Skúvoyar, har eini 94-96 fólk vóru við. Hetta vóru arbeiðsfólk saman við familjum sínum.

Umleið helmingurin fóru leygarmorgunin av Gomlu Rætt við Froyu beinleiðis til Skúvoyar, og hin helmingurin fóru við Teistanum til Skopunar og við bussi til Sands, har Froya førdi tey út til Skúvoyar.

Borgarstjórin í Skúvoy og kona hansara, Harry og Betty Jensen, bjóðaðu morgunmat. Tey ferðandi fingu drýl, skerpikjøt, rullupylsu, egg og sild.

Tá morgunmaturin var etin, varð leiðin løgd norður í Fagradal at síggja Ranvátoft og Ranvákeldu og haðani norður í Høvdan.

### Fantastiskur túrur

Tá fólkini hjá Articon komu heimaftur í bygdina út á seinnapartin, bjóðaðu borgarstjórin og konan øllum døgurða, og tá fingu tey lambakjøt at eta.

- Hetta var ein heilt fantastiska góður túrur, og tað er heilt ótrúligt, at hjúnini bæði kundu klára bæði at geva okkum øllum morgunmat og síðan døgurða á hesi ferðini.

Tað sigur stjórin í Articon, Jón Danielsen, sum eisini var við.

Hann vísir á, at tey øll høvdu ein sera góðan túr – úr enda í annan.

- Veðrið var so avbera gott, og náttúran í Skúvoy er vøkur. Vit høvdu harmoniku við okkum og sótu úti í túninum og sungu aftur við harmonikuni. Jú, hetta var bara ein so hugnaligur og góður túrur, leggur hann aftrat.

Jón Danielsen sigur, at byggifelagið í fleiri ár hevur skipað fyri ymiskum útferðartúrum kring um landið – fyri arbeiðsfólki og familjum teirra.

Articon hevur annars bygt vatnreinsiverk í Skúvoy, og í hesum sambandi hava menn hjá fyritøkuni – fleiri og færri – arbeitt í Skúvoy nú í summar.

Undirveitarar til vatnreinsiverkið eru Nomatek og LM-Electric.

Vatnreinsiskipanin hjá skúvoyingum varð liðug næst seinasta fríggjadag.



*Articon hevur í fleiri ár gjørt eina útferð fyri arbeiðsfólk og familjur teirra, og seinasta leygardag vitjaðu soleiðis út við 100 fólk í Skúvoy, har borgarstjórin og konan vístu stóran blíðskap við morgunmati og døgurða.*

# 10.000 krónur til Skúvoyar bygdarfelag

**Harry Jensen, borgarstjóri í Skúvoyar kommunu, fegnast um gávu, sum byggifelagið Articon hevur latið Skúvoyar bygdarfelag**

SKÚVOY

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri skrivaðu vit í Sosialinum um, at ein maður í Skúvoy, ið áður hevur siglt sum navigatørur, hevur gjørt av at geva Skúvoyar bygdarfelag eina peningagávu á 200.000 krónur.

Nú hevur endurstovnaða bygdarfelagið so fingið enn eina gávu til sítt arbeiði.

Tað er byggifelagið Articon, sum hevur gjørt av at geva felagnum ein kekk á 10.000 krónur.

Harry Jensen, borgarstjóri í Skúvoyar kommunu, sigur, at kekkurin varð handaður í Skúvoy seinasta leygardag, tá byggifelagið saman við familjum teirra var á útferð í oynni.

- Formaður í endurskipaða felagnum er Dánjal Hentze, men hann er ikki heima í løtuni, og tí var tað pápi hansara, Óla Jákup Hentze, sum tók ímóti kekkinum.

### Blíðskapur

Borgarstjórin sigur, at skúvoyingar eru sera fegnir um kekkin.

- Byggifelagið vildi geva bygdini hesa gávu, tí teir siga seg hava møtt so stórum blíðskapi í oynni, nú teir hava bygt okkum vatnreinsiverk her úti, sigur Harry Jensen.

Hann vísir á, at Skúvoyar bygdarfelag ikki hevur ligið púra lamið øll tey seinast árini, men nú verður so roynt at blása meira lív í felagið aftur.

- Teir, sum nú sita í nevndini, umhugsa hvat felagið skal gera. Sum er, eigur felagið eingi hús, men sum eg havi skilt, verða ymiskir møguleikar kannaðir, sigur Harry Jensen, borgarstjóri í Skúvoyar kommunu.



*Tað var Óla Jákup Hentze, pápi Dánjal Hentze, sum nú er formaður í Skúvoyar bygdarfelag, ið tók ímóti kekkinum, sum Articon vildi geva skúvoyingum*